# Kt-undirvísingin í barnaskúlanum



Kunningartøkni kt er vorðin ein partur av fólkaskúlanum.

Kunnu vit fáa kt at verða ein nátúrligan part av undirvísingini, soleiðis at næmingarnir læra nakað og fáa sum mest møguligt burturúr?

**Innihaldsyvirlit.**

1. Inngangur og endamál........................................................ - 3 -
2. Søguligt yvirlit. ........................................................................ - 8 -
3. Lógin um kt undirvísing.................................................... - 10 -
4. Kanningin.............................................................................. - 11 -
Um kanningina. ..................................................................... - 11 -
4.1 Skúlarnir og útbúnaður................................................... - 12 -
4.1.1. Skála skúli...................................................................... - 12 -
4.1.2. Gøtu skúli...................................................................... - 14 -
4.1.3 Leirvíkar skúli ............................................................... - 15 -
4.1.4 Eiðis skúli ....................................................................... - 15 -
Niðurstøða um útbúnaðin.................................................... - 16 -
4.2. Lærarin og KT ................................................................. - 17 -
4.2.1. Skála skúli...................................................................... - 17 -
4.2.2 . Gøtu skúli..................................................................... - 19 -
4,2.3. Leirvíkar skúli ............................................................... - 20 -
4.2.4 Eiðis skúli ....................................................................... - 22 -
Stutt felags niðurstøða fyri læraran og kt. ........................... - 24 -
4.3. Næmingarnir og KT,......................................................... - 26 -
Stutt niðurstøða fyri Næmingar og kt. ................................. - 28 -
5. How – Now ........................................................................... - 30 -
5.1 Hvussu gera vit á Skála nú. ............................................. - 30 -
5.2 Lesiætlan .......................................................................... - 34 -
5.3 Skal undirvísast í kt? Ella skal kt verða ein partur av undirvísingini? ....................................................................... - 38 -
5.4 Hvussu fáa vit flest møguligar lærarar við....................... - 39 -
6. Kt í fólkaskúlanum ............................................................... - 41 -
7. Niðurstøða ............................................................................. - 44 -
8. Spurningar til næmingarnar ................................................ - 50 -

Kunningartøkni kt er vorðin ein partur av fólkaskúlanum.

Kunnu vit fáa kt at verða ein nátúrligan part av undirvísingini, soleiðis at næmingarnir læra nakað og fáa sum mest møguligt burturúr?

## 1. Inngangur og endamál

Teldan og alnótin er í dag staðið har fólk samskifta. Alnótin knýtir fólk og virki um allan heim saman tvørtur um landamørk og mentanir. Alnótin er eisini við at gerast staðið har, ið keypt og selt verður. Menningin er mikil, tá vit hyggja aftur í tíðina og hugsa, um hvussu stutt søgan hjá telduni er. Við vaksandi búskapi gjørdist tørvurin á tí, sum menti seg til kunningartøkni kt, almikil. Og í dag er kt neyðugt, vit kunna als ikki hugsað okkum eina verð uttan kt. Um alnótin knappiliga gjørdist til einkis, hevði alt steðgað upp. Hugsa bara um okkara lítla oyggjasamfelag. Hava vit einki internet samband í ein dag, er galið. Kt er komið inn á okkum og er vorðið partur av skúlanum. Okkara uppgáva sum lærarar er at

læra og vísa næmingunum á kt og teir positivu møguleikar vit fáa við kt.

Í skjótt 10 ár hevur undirritaða undirvíst í Skála skúla. Ein part av tíðini havi eg undirvíst í teldu. Vit vóru ein tann fyrsti skúlin at fáa fleiri teldur og byrja telduundirvísing. Fyrstilærarin var eldhugaður innan hetta økið, og vit onnur royndu eftir førimuni at undirvísa, soleiðis sum okkara førleiki rakk til. Eftir at fyrstilærarin fór í annað starv, var eingin til at taka sær av teldunum. Teldurnar riggaðu ikki væl og ávirkaði hetta telduundirvísingina. Trupulleikarnir, eg havi møtt, eru m. a. hesir:

- Vandin er, tá **ein lærari situr inni við allari vitanini** innan uppseting og stýring av teldunum, og hann fer, hvat hendir so?
- Vandin er eisini, at **teldurnar slítast, gerast gamlar**, hvussu verður so?
- Vit hava havt **telduundirvísing** fyri seg og sum ein natúrligan **part av øðrum lærugreinum**.

- Tá vit hava havt telduundirvísing, hevur hon ofta verið í eini **p-fak skipan**. Ofta havi eg havt flokkar bara í teldu og **ongum øðrum lærugreinum,** og hevur hetta verið óheppið.
- Ofta hevur telduundirvísingin verið uppfatað sum **spæl, reikan á alnótini** uttan mál og mið.
- Næmingarnir vilja sleppa at **spæla, kjatta og taka niður tónleik av alnótini.** Skal hetta verða **aðalendamálið** við teldunum?
- Vit hava **ikki** havt nakra **lesiætlan.**
- **Eingin bók** er at ganga útfrá, og tí er spurningurin, hvat er so at gera?
- Torført er at **endurnýggja** seg sjálvan dag frá degi við nýggjum hugskotum, um hvat og hvussu undirvísast skal, tá einki er at ganga út frá.

Eg havi valt at skrivað um hetta evnið, **tí** eg kundi hugsað mær at funnið fram til:

- Hvussu fáa vit eina betri loysn innan telduundirvísing og kt til ein náturligan part av undirvísingini?

- Hvussu fáa vit sum mest burturúr og næmingarnir læra nakað?
- Og hvussu kunna vit fáa flest møguligar lærarar við?

Um eg røkki málinum, veit eg ikki. Men nú tá eg havi arbeitt við hesum evni burtur av, eri eg komin fram til nakrar loysnir, - partvíst út frá kanningini, og við at lesa og tosað við onnur um evnið.

Fyri at gera verkætlanina um at kt skal verða ein partur av skúlanum og ein nátúrligur partur av undirvísingini, fór eg út á skúlar í Eysturoynni at gera eina kanning.

Kanning er gjørd á skúlum í Eysturoynni, teir eru Leirvíkar skúli, Gøtu skúli, Eiðis skúli og Skála skúli. Eg valdi hesar skúlar til kanningina, tí teir allir eru á líknandi stødd, eitt sporaðir og hava 7 árgangir.

Eg havi gjørt tvey spurnarbløð, eitt til lærararnar at fylla út og eitt til næmingarnar. Á skúlunum havi eg tosað við skúlaleiðaran, telduvørðin og sæð skúlan og telduútbúnaðin á skúlanum. Meira um hetta í pkt. 4

**Uppgávan er bygd soleiðis upp:**

- Fyrst verður skrivað í stuttum um tað søguliga innan kt í Føroyska fólkaskúlanum.
- Síðan um hvat lógin sigur,
- og so verður farið til kanningina.
- Skúlar og útbúnaður
- Lærarin og kt
- Næmingarnir og kt
- Lesiætlanin
- How Now
  - Hvussu gera vit á Skála?
  - Skal undirvísast í kt? Ella skal kt verða ein partur av undirvísingini?
  - Hvussu fáa vit flest møguligar lærarar við
- Møguleikarnir við kt í fólkaskúlanum
- Niðurstøða

Nú til uppgávuna.

## 2. Søguligt yvirlit.

Fyrst til tað søguliga yvirlitið.

Kunningartøkni hevur broytt og fer framyvir at broyta fólkaskúlan. Skúlin er ikki longur skúlin, bygdin og bøkurnar. Teldan gevur næmingunum óteljandi møguleikar, og við alnótini ber til at ferðast út í heim og royna nýggjar leiðir og tó sita heima í bygdini.

Í skrivi dagfest 25. august 1997 setti Landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum eina nevnd at taka spurningin um kunningartøkni í fólkaskúlanum til viðgerðar. Henda nevnd kom við einum tilmæli, eini frágreiðing í mars 1998, ið fekk heitið: *"Kunningartøkni í fólkaskúlanum*." Í álitinum er m.a. nevnt, at avgerð er tikin um, at **Føroyar eru eitt kunningarsamfelag**. Kt eigur at verða ein sjálvsagdur partur av heildini í undirvísingini í fólkaskúlanum. Næmingar eiga at koma at kenna kt og duga at brúka hana til at samskifta, leita og at læra við.

Nevndin kom m.a. við tilmæli um, at.

- Skipað verður ein tænasta, nevnd KT-depilin, við tí uppgávu at samskipa, umsita og ráðgeva skúlaverkinum innan kt.

Í Løgmansrøðuni 1998 segði Løgmaður soleiðis. ”Kunningartøkni í fólkaskúlanum er átroðkandi mál. Ætlanin er at seta skjøtil á longu í hesum skúlaári.”

Kt-depilin varð settur á stovn 1.jan 1999.

Avgjørt varð at taka neyðug stig til at gera allar fólkaskúlalærarar betri fyri innan kt-økið, soleiðis at teldan kom við í undirvísingina. Lærarar, ið høvdu hollan kunnleika til kt, fingu vegleiðing og fóru á skeið. Síðan vórðu teir settir til at undirvísa í kt-skeiðunum runt Føroya land. Eftir hetta hava allir lærarar fólkaskúlans verið á kt-skeiðið.

Nógv er broytt uppá stutta tíð. Kt er nú vorðin ein partur av føroyska fólkaskúlanum. Nógvur útbúnaður er keyptur, vit eru komin eitt stig víðari.

- **Vit eru farin frá know – how**
- **Og eru komin til how – now**

Men hvat sigur lógin? Tað fara vit at hyggja nærri at nú.

## 3. Lógin um kt undirvísing

Lógin sigur ikki nógv um kt. Í nýggju fólkaskúlalógini frá 20. juni 1997, er einki beinleiðis at finna um kunningartøkni í undirvísingini í fólkaskúlanum.

Sambart **“Álit um nýggja fólkaskúlalóg §5, *skal kt verða tikið við í allar lærugreinar*.”** Tað áliggur øllum lærararum sambart álitinum at taka kt inn í allar lærugreinar.

Vit fara nú frá álitinum um, at kt **skal** verða tikið við í øllum lærugreinum til kanningina.

# 4. Kanningin

## Um kanningina.

Skúlarnir, ið vóru við í kanningini eru sum áður nevnt Leirvíkar skúli, Gøtu skúli, Skála skúli og Eiðis skúli. Allir skúlarnir vóru positivir og játtaðu at verða við í kanningini. Eg avtalaði tíð og fór sjálv út á skúlarnar við spurnarbløðunum.

Lærararnir fingu hvør sítt blað og 5. 6. og 7. flokkur fingu eitt annað blað við 3. spurningum at loysa. Sí spurnarbløð. Í meðan eg var á skúlunum, tosaði eg við telduvørðin og/ella skúlaleiðaran. Eg sá skúlarnar og teldustovurnar. Hetta var sera spennandi og gevandi. Eg fekk góð hugskot um telduundirvísing, reglur fyri teldustovuna o.a.

Við at verða víst runt á skúlanum av telduvørðinum og/ella skúlaleiðaranum og við at tosa við teir, kundi eg gera eina niðurstøðu um, hvat útgerð var á skúlanum.

Striltið hevur verið at fingið spurnarbløðini inn aftur frá lærararunum. Næmingarnir hava verið raskari at svara spurningunum.

Eg samlaði spurnarbløðini inn aftur, taldi upp og gjørdi nakrar niðurstøður.

Eg haldi, at eg havi fingið eina lýsing av støðuni sum hon er, við teimum spurnarbløðum eg havi fingið aftur. Svarini frá næmingunum siga eisini rættiliga nógv um undirvísingina. Hóast allir næmingar ikki svara líka nógv, so geva svarini tó eina lýsing av skúlanum og kt.

## 4.1 Skúlarnir og útbúnaður

### 4.1.1. Skála skúli

Skála skúli var ein av teimum fyrstu skúlunum at fáa teldur. Alt broytist so skjótt innan telduverðina, so teldurnar vóru gamlar og riggaðu illa ta síðstu tíðina ár 2003, men teldurnar eru skiftar út við ársskiftið 2004. Teldurnar standa í einari skúlastovu, har eru 15 teldur. Ætlanin er, at gomlu teldurnar, tær ið eru í hampiligum standi, koma at standa inni í nøkrum øðrum skúlastovum. Hesar skulu hava undirvísingarforrit, Word og Excel inni. Eisini er ætlanin at tey føroysku forritini skulu liggja inni, sum t.d. 10fingra, soleiðis at lættari er at fara inn á teldurnar í tímanum. Teldurnar

hava ikki printara, men møguleiki er at brúka diskil, um skrivast skal út.

Hetta er gott, tá arbeitt verður í bólkum ella verkstøðum, og betri er at hava næmingarnar inni í somu stovu, ella nær við. Og lættari er at fylgja við, hvat næmingarnir gera, og um teir gera tað, teir skulu.

Teldustovan er meira upptikin nú, ið nýggju teldurnar eru uppsettar, tí er gott við fleiri teldum runt um á skúlanum.

Skúlin hevur tveir vanligar printarar og ein lit-laserprintara á netinum.

Skúlaleiðarin hevur eina teldu, bókavørðurin eina, og ein er í arbeiðsrúminum hjá lærararunum. Hesar teldur hava printara og skannara. Kommunan eigur eina kanón, sum skal verða á skúlanum, - skúlin umsitur hana.

Inni á lærarastovuni hongur listi uppi, har lærararnir melda seg til, um teir skulu inn í teldustovuna við næmingunum.

Ætlanir eru at seta tráðleyst net upp og knýta teldurnar saman á netið, ella at seta nakrar teldur inn í stovuna uppi yvir teldustovuni fyri síðan at binda tær til netið.

### 4.1.2. Gøtu skúli

Í Gøtu skúla eru teldurnar gamlar, men ætlanin er at skifta tær út í næstum. Har er ein stór teldustova við 24 teldum, printara og fastari kanón. Netskipan er løgd um allan skúlan, soleiðis at møguleiki er at hava teldurnar inni í teimum einstøku skúlastovunum.

Gøtu skúli hevur fingið nýtt bókasavn við sjey nýggjum teldum, har er eisini eitt gott arbeiðsrúm til lærararnar við teldu og printara. Telda er eisini inni á lærarastovuni, umframt at skúlaleiðarin hevur teldu. Kommunan hevur brúkt nógvar pengar til telduútbúnaðin á skúlanum og er positiv at leggja meira afturat, soleiðis at skúlin er væl fyri á kt-økinum.

## 4.1.3 Leirvíkar skúli

Í Leirvíkar skúla er ein góð teldustova, við væl virkandi teldum. Har er eisini netskipan løgd um allan skúlan við møguleika at hava teldurnar í skúlastovunum og aðra staðni. Í teldustovuni eru 18 teldur við xp. Servarin er ein 2003 servari. Skúlin hevur eina kanón og ein lit-netprintara hp4600. Eftir ætlan skal kopimaskinan eisini á netið. Skúlin hevur tvey digital myndatól og ein digitalan videoupptakara. Eitt surround annlegg við dvd er eisini sett upp. Ætlanin er at keypa eina kanón afturat. Pengar vórðu settir av, og nú eru 9 farteldur keyptar, soleiðis at hvør lærari hevur eina farteldu.

## 4.1.4 Eiðis skúli

Á Eiðis skúla hava tey fingið nýggjan nútímans bygning afturat gamla skúlanum. Hesin er sera væl útgjørdur við øllum nútímans hentleikum. Har er ein sera væl útgjørd teldustova. Har eru 16 teldur við xp. Servarin er ein Windows 2000 servari. Ein lit-laserprintari er í teldurúminum, og hann er tann, ið mest verður brúktur. Net er lagt um allan skúlan, so møguleiki er at hava

teldunar í øllum skúlastovunum. Gomlu teldurnar standa í skúlastovunum, men verða ikki brúktar so nógv.

Næmingarnir hava atgongd til 21 teldur tilsamans, gomlu teldunar hava windows 98. Skúlin hevur eina kanón. 1 digitalt video og foto tól og 1 fartelda hoyra eisini til skúlan.

Í fundarhølinum er ein telda við printara og skannara. Har verður í næstum sett upp arbeiðspláss til lærararnar, soleiðis at hvør lærari hevur sítt arbeiðspláss.

Á bókasavninum eru tvær teldur, ein er til vanligt brúk og ein er til útlán.

Eiðis skúli hevur licens avtalu til Mikroværkstedet um forrit. Skúlaleiðarin segði, at nógv góð forrit eru, trupulleikin er bert at seta seg inn í tey. Avgjørt er nú, at lærararnir seta seg inn í eitt forrit, fyri síðan at hava skeið fyri hinum starvsfeløgunum.

## Niðurstøða um útbúnaðin.

Allir skúlar eru væl við innan kt-útbúnaðin. Allir skúlar hava teldu-útgerð. Har kt-búnaðurin er vorðin eldri, verður roynt at endurnýggja hann. Eitt sum er áhugavert, er at kerv (kaðalnet) er lagt um allan skúlan í Leirvík, Gøtu og á Eiði, men tað verður ikki nógv nýtt. Hetta er sera kostnaðarmikið, og tað er spell, at gera

eina íløgu, um hon ikki verður nýtt. Í dag ber til at sleppa bíligari við at seta tráðleyst net upp.

Eingin føst avtala er um, hvaðani skúlarnir fáa telduhjálp. Hetta er harmiligt, tí skúlarnir hava ikki nógvar pengar at arbeiða við og ongar at spilla burtur til óneyðuga útgerð og ivasama ella vánaliga hjálp.

Eingin felags loysn er uppá, hvørji forrit áttu at verið á skúlunum ella hvørji forrit eru góð. Tað kundi verið ein hjálp fyri skúlarnar, um teir funnu eina felags loysn á hesum øki.

Sera spennandi var at vera á skúlunum. Eg kundi hugsað mær, at vit lærarar komu meira runt at vitja hvønn annan og sóu, hvussu aðrir skúlar arbeiða. Kanningin hevur eisini givið mær nógvar góðar og hentar upplýsingar.

## 4.2. Lærarin og KT

### 4.2.1. Skála skúli

Kanningin er gjørd, áðrenn nýggju teldurnar vóru uppsettar, lærararnir halda tó, at kt er partur av Skála skúla, og skúlin er í

ávísan mun væl fyri innan kt. Ymist er hvat lærararnir svara uppá teir ymisku spurningarnar. Allir halda tó, at neyðugt er við eini lesiætlan. Teir halda at skúlaleiðarin og flokslærarin skulu hava ábyrgd av, at lesiætlanin verður fylgd. Skála skúli hevur gjørt eina lesiætlan í des. 2003.

Teir halda, at lesiætlanin skal verða skipað fyri at náa ávís mál, sum næmingarnir skulu læra, tó so, at pláss eisini er fyri nýhugsan. Næmingarnir skulu læra at brúka telduna sum eitt arbeiðsamboð.

Teir halda, at teldurnar verða mest nýttar til undirvísing. Teldurnar riggaðu ikki væl, vóru gamlar, og ikki nóg mikið av pengum var sett av til keyp av telduútgerð. Kanningin vísir eisini at pengarnir allarhelst ikki høvdu verið brúktir til bøkur o.a, um teir ikki vóru nýttir til teldur.

Teir halda, at kt er neyðugt og er við til at gera skúlan meira nútíðarhóskandi. Lærararnir eru ymiskir á máli, um næmingarnir fara at klára seg í samfelagnum, um teir ikki nema kt í skúlanum. Teir halda, at tað er neyðugt við føroyskum teldutilfari. Teir hava góðan møguleika at brúka teldurnar í skúlanum, men halda tó, at tað er neyðugt við eini teldu heima.

Fleiri av lærararunum viðmerktu, at tað var torført at svara spurningunum, tí støðan var sum hon var, við teldunum. Men teir

gleddu seg til nýggju teldurnar vóru uppsettar og vónaðu at tær komu at rigga betur, enn tær gomlu gjørdu seinastu tíðina. Onkur av teimum hevur eisini nevnt, at gott er at hava telduvørð á skúlanum, sum heitast kann á, tá trupulleikar eru.

## 4.2.2 . Gøtu skúli

Gøtu skúli er væl fyri á kt-økinum. Flestu lærararnir hava undirvíst í teldu, og kt er ein partur av teirra undirvísing. Skúlin hevur ikki eina kt-lesiætlan, men lærararnir halda at kt-lesiætlanin í ávísan mun er neyðug. Teir hava tikið kt-koyrikortið og onnur skeið, men halda ikki, at møguleikin at koma til onnur kt-skeið er nøktandi. Lærararnir halda seg vera væl fyri á kt-økinum og halda, at allir lærararnir hava ábyrgdina av telduundirvísingini hjá næmingunum. Teldurnar eru ikki nýttar til spæl, men til undirvísing. Nóg mikið er av teldum á skúlanum, men tær riggaðu minni væl, júst tá kanningin varð gjørd. Teldurnar eru ikki nóg nýggjar, men nóg mikið av pengum eru nýttir til kt. Ivasamt er um pengarnir høvdu verið nýttir til nakað annað, um teldurnar ikki høvdu verið keyptar. Lærararnir halda avgjørt, at kt er neyðugt og er við til at gera skúlan betri og meira nútíðarhóskandi. Teir halda

tó at næmingar, ið ikki nema kt í skúlanum, fara at klára seg, og at foreldrini hava felags ábyrgd av kt-menningini hjá barni teirra. Tað er avgjørt neyðugt við føroyskum tilfari til undirvísingina. Teir hava góðar møguleikar at nýta teldurnar í skúlanum, men hava eisini brúk fyri at hava eina teldu heima við hús.

## 4,2.3. Leirvíkar skúli

Leirvíkar skúli er eisini væl fyri á kt-økinum. Helvtin av lærararunum hevur undirvíst í kt og kundu hugsað sær at hildið fram við hesum. Einans ein lærari sigur, at hann kundi ikki hugsað sær at undirvíst í kt. Men teir halda allir, at kt er ein partur av teirra undirvísing. Skúlin hevur ikki eina lesiætlan, men lærararnir halda, at tørvur er á einari. Lærararnir hava tikið onnur skeið umframt kt-koyrikortið, og teir flestu halda, at tey samsvara teirra kt tørv.

Ein heldur ikki, at tað er flokslærarin, ið hevur ábyrgd av at lesiætlanin verður fylgd. Lærararnir halda, at tað er felags ábyrgd, at lesiætlanin verður fylgd.

Teldurnar verða mest nýttar til undirvísing ikki so nógv til spæl.

Teldurnar rigga væl og eru nóg nýggjar. Helvtin av lærararunum halda, at nóg mikið av peningi verður nýtt til kt, hin helvtin heldur tað ikki. Ein heldur, at um pengarnir ikki vóru nýttir til kt, so vóru teir nýttir til bøkur o.a. Ein annar lærari heldur tað mótsatta.

Allir lærararnir halda, at kt ger skúlan betri, meira nútíðarhóskandi og at tað er neyðugt við kt í skúlanum. Helvtin heldur, at næmingarnir tó fara at klára seg, um teir ikki fingu kt undirvísing, hin helvtin meinar tað mótsatta. Foreldrini hava ábyrgd av kt menningini hjá barninum, halda lærararnir.

Allir halda, at tað er neyðugt við føroyskum teldutilfari. Teir hava góðan møguleika at brúka teldurnar í skúlanum, men halda tó, at tað er neyðugt við eini teldu heima.

Viðvíkjandi hvat lesiætlanin skal innihalda, verður nevnt:

*At næmingurin skal kunna loysa allar vanligar kt-uppgávur á sínum støði. "Duga at brúka tekstviðgerð, rokniark, myndaforrit, alnótina, leitiskipanir, tekniforrit, "genveje", videoredigering á teldu, rættstavaran og orðabøkur. o.m.a."*

*"Ásetingar um hvat næmingar skulu duga á hvørjum aldursstigið t.d 1. flokki: tendrað, sløkkja, logga inn, logga av, 10fingra, einføld roknispøl."*

*Neyðugt at lærarin hevur ein persónligan áhuga í teldutøkni og teldulæru. Undirvísingin skal vera at fáa eina fjølbroytta uppgávu og so brúka ymisku kt-møguleikarnar til at loysa og leggja fram uppgávuna.*

*Í hvørjum toymi má vera ein kt-kønur, sum kann standa fyri kt-partinum hjá flokkinum og eisini vegleiða hini í toyminum.*

*Umráðandi er fyri smáar skúlar, sum hava fáar tímar til telduvørð at hava góðan tænastu veitara og telduskipanir, sum eru góðar og einfaldar at umsita.*

### 4.2.4 Eiðis skúli

Einans tveir lærarar av Eiði hava svarað spurningunum. Fyrsti lærarin hevur spurt aftur eftir spurnarbløðunum, tó uttan at hann fekk fleiri. Men tað, ið hesir báðir hava svarað vísir tó, at teir halda, at Eiðis skúli er væl við á kt-økinum. Kt er ein partur av skúlanum, og skúlin er væl fyri á hesum økinum. Annar hevur undirvíst í kt, hin ikki. Hann kundi gott hugsað sær at undirvíst í

kt; men kt er ikki ein partur av hansara undirvísing, sum nú er. Hann hevur ikki tikið kt-kortið ella verið á øðrum skeiðum. Hin hevur bæði tikið kt-kortið og verið á øðrum skeiðum og heldur, at møguleikin at koma á skeið er nøktandi, hin veit ikki. (Á Eiðis skúla eru tveir vikarar, annar av teimum, ið hevur svarað spurningunum, er vikarur uttan læraraútbúgving.)

Skúlin hevur onga lesiætlan, men neyðugt er við eini. Teir halda báðir at felags ábyrgd er av, at lesiætlanin verður fylgd. Teldurnar verða mest nýttar til undirvísing og ikki so nógv til spæl. Annar heldur at næmingarnir halda at teldan er spæl.

Teldurnar rigga væl og eru nóg nýggjar, men ikki nóg mikið av pengum eru settir av til teldur. Pengarnir høvdu ikki verið nýttir til annað á skúlanum, um teir ikki vóru nýttir til kt. Kt er neyðugt og er við til at gera skúlan betri og meir nútíðarhóskandi. Annar heldur at næmingarnir tó fara at klára seg uttan telduundirvísing, hin veit ikki. Men teir halda ikki, at foreldrini hava ábyrgd av kt menningini hjá teirra barni. Teir halda, at tað er neyðugt við føroyskum teldutilfari. Teir hava góðan møguleika at brúka teldurnar í skúlanum, men halda tó, at tað er neyðugt við eini teldu heima.

## Stutt felags niðurstøða fyri læraran og kt.

Nakað gongur aftur. Næstan allir lærararnir hava verið á skeiðum innan teldu og hava kt-kortið. Skúlarnir hava onga lesiætlan, men flestu lærararnir halda tó, at tað er neyðugt við eini lesiætlan. Nógv áhugavert kemur fram her.

Ynski hjá lærarunum um at hava eina teldu heima. Tørvandi skeiðvirksemi. Tørv á føroyskum undirvísingartilfari.

Lærararnir svara flestir, at neyðugt er við eini lesiætlan. Kunnu teir ikki undirvísa uttan? Jú víst kunnu teir tað. Men skulu allir næmingar hava møguleika at ogna sær kunnleika á økinum, er neyðugt við eini lesiætlan. Annars verður roknað við, at nakrir næmingar eru væl fyri innan kt, meðan aðrir næmingar als ongan kunnleika hava innan hetta økið. Tíbetur hava fleiri skúlar nú gjørt sína lesiætlan fyri teldu, so sigast má, at vit eru væl á veg.

Men hvør hevur ábyrgd av, at lesiætlanin verður fylgd? Telduvørðurin kann ikki hava alla ábyrgdina ella fylgja við, um næmingarnir hava lært alt tað, teir skuldu. Skúlaleiðarin kann heldur ikki fylgja við øllum. Telduvørðurin kann fylgja eitt sindur við og royna at hjálpa og stuðla lærarunum soleiðis, at allir koma

inn í kt-verðina. Eg havi roynt at farið inn í teldustovuna við onkrum lærara og flokki hansara fyri síðani at fáa gongd á. Hetta skuldi hjálpt. Toymið má hava ábyrgdina av, at næmingarnir fáa telduundirvísing. Setur ein lærari seg ikki føran fyri at undirvísa í teldu, so má ein annar lærari í toyminum átaka sær ábyrgdina at undirvísa næmingunum í teldu.

Allir lærararnir í kanningini hava góðan møguleika at brúka teldurnar á skúlanum. Men allir halda, at tað er neyðugt við teldu heima. Lærarar eru í tí støðu, at heimaarbeiði er nógv, og tá hevði verið gott at havt eina teldu heima, sum kundi lætt lærarunum um arbeiðið. Flestu lærarar, sum hava møguleika til tað, hava sjálvir ogna sær teldu heima. Gøtu skúli hevur útvega lærarunum teldu heima og Leirvíkar skúli útvegar eisini farteldur til lærararnar.

Kanningin vísir eisini, at allir lærarar sakna føroyskt undirvísingartilfar innan kt-økið. Meira undirvísingartilfar á føroyskum eigur tí at koma út. Hetta átti at verið nakað, sum bókagrunnur Føroya Læraraskúla átti at tikið og tekur sær meir av.

Stórur tørvur er á hóskandi skeiðum til lærarar. Ofta liggja skeiðini í vikuskiftunum, og er hetta ikki nøktandi. Tørvandi vilji er eisini at gjalda vikartímar til skeið mitt í viku.

Samtykt var, at Føroyar skuldu verða eitt kt-samfelag. Nakað er hent innan skúlagátt, men ikki nokk, játtanirnar fylgja ikki við.

## 4.3. Næmingarnir og KT.

Næmingarnir fingu 3 spurningar.

1. **Er neyðugt við telduundirvísing?**
2. **Hvat heldur tú teldan skal brúkast til?**
3. **Hvat heldur tú er ein góð telduundirvísing?**

Eg havi valt ikki at býta næmingarnar upp í bygdir, men tosi samlað um tað, næmingarnir hava svarað. Næmingarnir svara nokkso javnt uppá spurningarar.

### Er neyðugt við telduundirvísing?

Tá spurt verður, um telduundirvísing er neyðug, svara flestu næmingarnir stutt ja, umleið 6% siga nei. Teir svara stutt og einki annað

## Hvat heldur tú teldan skal brúkast til?

Tá spurt verður, hvat teldan skal nýtast til, svara 6%, at hon skal nýtast til spøl. Hini hava nógv góð hugskot, um hvat teldan kann nýtast til, at gera skúlating, lesa t-post, lesa tíðindi, skriva rokningar, kjatta, leita á internetinum. Í Gøtu skúla hava næmingarnir lært at brúka rokniark, hetta sæst aftur í svarunum. Tey eru glað fyri at læra at nýta rokniark. o.a.

## Hvat heldur tú er ein góð telduundirvísing?

Til spurningin, hvat heldur tú er ein góð telduundirvísing, eru nøkur áhugaverd svar, sum eg haldi kunnu siga okkum lærararum nakað. Við at lesa hesi svar, kunnu vit hugsa um okkara undirvísing og tillaga hana soleiðis, at vit fáa eina góða undirvísing.

- Nógvir næmingar halda, at tann besta undirvísingin er, tá teir sleppa at spæla.
- Nøkrum dámar væl at læra og síðani at gera, sum tey vilja teir síðstu minuttirnar, t.v.s. kjatta ella annað.
- Onkur heldur, at ein góð undirvísing er, tá tað er friðarligt.
- Onkur vil læra at brúka telduna.

- Onkur heldur, at tá lærarin greiðir frá, hvussu ein skal gera, brúka telduna rætt og hann hjálpir til, tá er tað gott.
- Onkur er glaður, tá lærarin brúkar kanónina at læra við.
- Onkur nevnir, tá ið tey læra at brúka excell, og skriviforrit og internetið.
- Fyrst at læra blindskrift og at gera heimasíður.
- Onkur er glaður um webquestina tey hava havt og lært av.
- Men eisini eru tað tey, ið ikki vita, hvat ein góð undirvísing er.

## Stutt niðurstøða fyri Næmingar og kt.

Næmingarnir halda, at tað er neyðugt við eini telduundirvísing, hon kann brúkast til nógv ymiskt og tey hava nógv góð hugskot um, hvat hon kann brúkast til. Nógv vilja sleppa at spæla á teldunum; men tey eru eisini vitandi um, at neyðugt er við undirvísing, skal nakað meir koma burtur úr.

Men hvussu er við Skála skúla í dag? Tað fara vit at hyggja eitt sindur nærri uppá nú.

Kanningin vísur okkum á nakrar felags trupulleikar, fleiri viðurskifti ganga aftur. Hvussu koma vit so víðari og hvussu fáa vit broytt støðu okkara.

# 5. How – Now

Hvussu nú.

Á Skála hava vit skift teldurnar út, vit hava nýggjan fyrstalærara og nýggjan telduvørð. Vit byrja á ein hátt av nýggjum; men vit hava eitt sindur av vitan. Vit hava know - how og kunna tí fara eitt stig víðari til how – now. Kt er ein partur av okkara skúla, men vit skulu hava kt til ein natúrligan part av undirvísingini.

## 5.1 Hvussu gera vit á Skála nú.

Telduundirvísing var ikki góð, áðrenn vit fingu tær nýggju. Orsøkin var, at teldurnar vóru í vánaligum standi. Teldurnar vóru nógv nýttar til spøl o.a. Ofta er trupult at koma inn í teldustovuna, við tí fyri eyga at læra næmingarnar nakað annað, enn tað tey ynsktu. Næmingarnir skuldu fyrst yvirtalast til at gera tað, lærararin vildi. Meðan tú hjálpti onkrum, sat ein annar næmingur og lurtaði eftir tónleiki, hann hevði tikið niður av alnótini. Tá næmingarnir sita og lurta eftir tónleiki, er nógv óljóð inni í teldustovuni. Teir sita við oyramikrofonum og fáa ikki tað við, sum lærarin sigur. Teir tosa hart, syngja við og hoyra ikki seg sjálvar.

Tónleikurin tekur eisini nógv pláss á ambætaranum.

Vit hava fingið nýggjan servara settan upp. Vit avgjørdu at royna at seta forboð fyri at taka tónleik niður, og vit strikaðu tann tónleikin, ið lá á gamla ambætaranum. Hetta var gjørt tí, at tað tók ov nógv pláss.

Skjótt funnu vit útav, at vit sluppu undan trupulleikanum, at næmingarnir sita og lurta eftir tónleiki, meðan undirvíst verður. Tað er nógv lættari at undirvísa nú, øll fáa alt við, og næmingarnir hoyra tá tú sigur eitthvørt.

Kanska er tað keðiligt fyri næmingarnar, at teir ikki sleppa at lurta eftir tónleiki í skúlanum. Men vit halda tó, at tey flestu hava møguleika at lurta eftir tónleiki heima.

Teldurnar rigga væl. Vit hava fingið fast samband út á alnótina, hetta koyrir skjótt, og stuttligt er at fara út á alnótina. Ein næmingur helt nú ein dagin; “Tað er so stuttligt at hava teldu nú.”

Heimasíðan er fingin at virka aftur og verður dagførd við jøvnum millumbilum. T.d. var 6. og 7. flokkur á vitjan í Íslandi, teldupostur var sendur heim, lagdur út á heimasíðuna, og tey avvarandi lósu spent um, hvussu gekst í Íslandi.

Vit hava ásett reglur fyri teldurnar, hetta hugskotið fekk eg, tá eg vitjaði Eiðis skúla.

## Reglur ella leiðbeiningar fyri nýtslu av teldunum.

| Nýtsla av teldunum. |
| --- |
| ▪ Farið væl um teldurnar.<br>▪ Teldurnar eru einans til undirvísing.<br>▪ Næmingar eru einans í teldustovuni, um lærari hevur eftirlit við teimum.<br>▪ Tað er ikki loyvt at taka niður sangir o.a.<br>▪ Ikki er loyvt at taka disklar ella fløgur við heimanífrá til at seta í teldurnar.<br>▪ Uppsetingar av teldunum skulu ikki broytast, t.d bakgrundir.<br>▪ Øll útskriving skal vera avtalað við læraran.<br>▪ Øll arbeiði skulu goymast á ambætaranum.<br>▪ Heimasíður við óhóskandi innihaldi skulu ikki latast upp.<br>▪ Ikki er loyvt at eta og drekka við teldurnar. |

## Reglur ella leiðbeiningar fyri nýtslu av alnótini.

| Vís góðan sið á internetinum |
| --- |
| ▪ Tá tú kjattar ella skrivar teldupost<br>▪ Skriva fólkaliga -<br>▪ Nýt ikki banniorð ella ófantalig orð |

Vit hava við vilja ikki gjørt fleiri leiðbeiningar ella reglur her. Um lærarin altíð hevur eftirlit við næmingunum í teldustovuni, skuldi tað fyribyrgt, at t.d. heimasíður við óhóskandi innihaldi verða latnar upp.

## 5.2 Lesiætlan

Hví skulu vit hava eina lesiætlan í skúlanum? Kunnu lærararnir ikki undirvísa uttan? Jú tað kunnu teir flestu. Men lesiætlanin er ætlað at tryggja, at allir næmingar eru eins væl fyri, tá teir fara út úr fólkaskúlanum. At teir hava lært neyðugu arbeiðsamboðini, soleiðis at teir sjálvir eru førir fyri at arbeiða víðari við telduni sum eitt amboð. Vit í Skála skúla hava gjørt lesiætlanina, soleiðis at vit halda, at vit megna at fylgja henni uttan at verða løst alt ov føst.

| |
|---|
| **Lesiætlanin hjá Skála skúla.** |
| Teldan í skúlanum |
| Endamálið við undirvísingini er:<br>- at næmingarnir læra at brúka vanligastu KT-amboðini.<br>- at KT gerst ein náttúrligur partur av undirvísingini.<br><br>KT- økini, arbeitt verður við, eru:<br>▪ Telduforrit t.d. Rokna og 10-fingra<br>▪ Tekstviðgerð í Word<br>▪ Rokniark í Excel<br>▪ Alnótin og teldupostur t.d. Samhøll. |

Flokslærarin hevur ábyrgd av, at telduundirvísingin verður fylgd.

## 1. undirvísingarpartur. 1.-3. skúlaár:

**Forrit**: Paint Word.

**Førleikar.** Teldan v.m.

- skýggi, knappaborð, mús
- tendra og sløkkja
- fara inn á kervið
- lata upp og aftur gluggar
- tendra og sløkkja forrit
- músavenjing
- pílaknappar og innknappur
- tekna við Paint
- goyma og heinta á ambætaranum
- fara væl um útbúnaðin

### Tekstviðgerð

- skriva bókstavir
- skriva orð við stórum og smáum.

- strika og rætta í teksti
- broyta skrift og stødd
- skriva smáar søgur
- goyma og heinta í egnum mappum
- skriva út.

### Læra at nýta tøk telduforrit

t.d.

Rokna, Lugo, Barnabíblian og 10-fingra

## 2. undirvísingarpartur. 4.-7. skúlaár:

**Forrit:** Word, Excel, Power point og Samhøll

### Tekstviðgerð

- seta myndir inn
- broyta stødd, snið, lit v.m. í teksti
- klippa, avrita, seta inn
- avrita ímillum skjøl/forrit
- seta upp í punkt
- nýta rættstavaran (fø/da/en)
- nýta orðabøkur (fø/da)
- umbróta tekst um myndir

- fáa kunnleika til printara og trupulleikar við at skriva út
- vísa útskrift

## Rokniark

- gera einfaldar frymlar
- gera ritmyndir

## Alnótin

- fara inn í Samhøll
- senda og lesa teldupost og samskifta við næmingar
- leita á telduni
- leita á alnótini.
- royna leitiskipanir
- práta um hvat er sømiligt, etikkur á alnótini

## Annað

- framløgu við power point í 6.-7.fl

## 5.3 Skal undirvísast í kt? Ella skal kt verða ein partur av undirvísingini?

Í flestu lærugreinum og hjá flestu lærararum er kt ein partur av undirvísingini. Næmingarnir skulu eisini fáa kt undirvísing. Hetta ger teir betri førar fyri at loysa tær uppgávur, ið loysast skulu innan hinar lærugreinarnar. T.d. um vit skulu skriva ein stíl, hetta gerst eitt sindur torført um næmingarnir als ikki duga at brúka Word, skriva við stórum o.s.fr.

Vit hava tikið kt inn sum ein part av eini p-fag skipan, og hetta eru vit sera glað fyri. Lærarin sum annars undirvísir í føroyskum ella donskum, kennir næmingarnar. P-fag skipanin er 6 vikur í senn og skiftir ímillum t.d. evning, hondarbeið og teldu. Soleiðis skuldu næmingarnir havt møguleika at komi inn í teldustovuna til telduundirvísing 2 ferðir 6 vikur í skúlaárinum.

Teldan er eisini ein nátúrligur partur av aðrari undirvísing. T.d. tá vit hava gjørt túrar, gera vit plansjur við hjálp av telduni. Vit hava eitt digitalt myndatól, taka myndir og leggja tær á ambætaran. Næmingarnir hyggja at myndunum, taka tær t.d. inn í Word og skriva hóskandi tekst til.

Tá vit lesa bøkur, kunnu vit fara út á netið og finna tilfar um rithøvundan.

First class verður nógv brúkt til samskifti við næmingar og foreldur.

Vit hava eitt gamalt, men gott rokniforrit, ið vit eru glað fyri og sum gevur næmingunum góðar møguleikar at læra torførar roknihættir á ein lættan og kreativan hátt .

## 5.4 Hvussu fáa vit flest møguligar lærarar við.

Alneyðugt er, at **góð útgerð** er á skúlunum, og at hon riggar væl. Fleiri lærarar eru ikki so vanir at brúka teldurnar, og hetta ger teir ósikrar, og teir missa skjótt móti. Tá ið farið verður inn í teldustovuna, mugu teldurnar síggja út, sum tá lærarin seinast var har. Tað, at teldan og alnótin virka er sera týdningarmikið. Um lærarin ferð eftir ferð upplivir niðurlag, tá ið hann kemur inn í teldustovuna, endar tað við at hann velur telduna frá í undirvísingini.

Tí er týdningarmikið, at vit skapa so góðar karmar sum møguligt.

Telduvørðurin má verða á staðnum og til at heita á. Tí er umráðandi at telduvørðurin er tøkur og ikki er ovbyraður av undirvísing o.ø.

Lærarar mugu tosa saman, læra av hvørjum øðrum og harvið fáa nógv og góð hugskot. Eisini við at vitja aðrar skúlar fær ein nógv góð hugskot. Møguleikin at koma á skeið má eisini gerast betri, og tímar og játtanir mugu fylgja við.

Lærarin má hava eina teldu og samband við alnótina, soleiðis at hugur hansara at seta seg inn í kt økist. Tað kann ikki verða uppgávan hjá hvørjum einstøkum lærara sjálvur at gjalda alt hetta. Her má samfelagið leggja sítt til.

# 6. Kt í fólkaskúlanum

Teldan er framtíðin og hon hevur óteljandi møguleikar við sær, og her komi eg inn á nakrar av teimum. Uppgávan hjá telduvørðunum er m.a. at fáa hinar lærararnar at síggja kt møguleikarnar og fáa teir drignar inn í telduverðina.

### Telduvørðurin.

Tað liggur nógv á tær sum telduvørður.

Keyp av neyðugari og rættari útgerð og fáa hinar lærararnar við.

Tú mást tola eitt sindur av hvørjum, grenj og annað tá tingini ikki ganga, sum tey skulu. Tú mást fáa útgerðina at rigga og síggja til, at allir lærararnir koma við á kt-økinum. Fá teir inn í teldurúmið saman við næmingunum. Sum telduvørður mást tú eisini seta teg inn í forrit og kunna vegleiða hinar lærararnar um, hvørji forrit eru tøk, og hvørji forrit skulu verða keypt til skúlan.

### Forrit.

Eitt ótal av forritum finnast, t.d. innan Nátúr og Tøkni, Klodens kræfter. Har eru møguleikar hjá næmingunum at síggja filmar av

eldgosum, jarðskjálvtum, ódnarveðri. Tey kunna lurta eftir, hvat eygnavitni siga. Tey kunna lesa og lurta eftir tilfari, sum er langt út um tað nøkur bók kann geva. Rokniforrit og lesiforrit av ymiskum slag geva eisini mangar ymiskar mátar, nógv meir enn ein bók kann geva.

### Alnótin.

Alnótin hevur óteljandi møguleikar. Sjálvandi kunnu vit altíð tosa um alt tað vánaliga, sum er á nótini. Men har finst eisini nógv gott. Tað er so lætt og spennandi, tá ið tú hevur lisið bókina Karius og Baktus, at fara út á alnótina at leita eftir Thorbjørn Egner, hvør var hann, nær og hvar var hann føddur og hvussu sá hann út. Út frá tí tú finnur, kanst tú t.d. printa út og gera eina plansju.

### Heimasíðan.

Heimasíðan hjá skúlanum, er eisini ein annar týdningarmikil partur, at vísa skúlan úteftir. Heimasíðan er eitt gott samskifti ímillum heim og skúla og umheimin.

Her kunnu foreldur, bygdarfólk og onnur fáa ein møguleika at hyggja inn í skúlan og síggja, hvat gongur fyri seg har.

Tí er umráðandi at heimasíðan er virkin, er “up to date”.

## Kostnaðarmikið

Alt kostar pengar, og tað gera teldurnar, forritini og sambandið við alnótina eisini. Men skulu vit verða ein partur av kt-verðini, sum Løgtingið setti út í kortið, so má tað almenna eisini leggja játtanir og pengar til.

# 7. Niðurstøða

Vit eru á veg, vit eru komin eitt stig víðari.

Vit eru farin frá **know - how til how - now.**

Samtykt var, at Føroyar skuldu verða eitt kt-samfelag, teldurnar skuldu inn í skúlan. Lærararnir hava fingið kt-koyrikort. Nógv er hent.

Men enn er nakað, sum haltar. Vit liva ikki upp til samtyktina. Sum so ofta fær skúlin stungið nakað yvir høvdið, uttan at játtanir um stuðul og upplæring av lærarum fylgir við.

Kanningin hevur sett gongd á hjá mær sum telduvørði, og tað ávirkar meg, og eg kann ávirka skúlan, eg undirvísi á. Nakrar royndir høvdu vit áðrenn. Um vit leggja alt saman, kunnu vit bøta um umstøðurnar.

**Teld**. Undirvísing í teldu soleiðis at næmingarnir fáa ein hollan kunnleika um teldu nýtslu. So at teir duga at brúka hana sum eitt amboð. Lærarin, ið undirvísir í teldu, má hava næmingarnar í meir enn bara í teldu. Teldu-undirvísingin kann verða ein partur av eini p-fakskipan

**Lesiætlanin**. Gott amboð hjá lærararunum at ganga út frá hvat næmingarnir skulu duga. Toymið má taka sær av, at lesiætlanin verður fylgd.

**Heimasíðan** ger, at samskiftið ímillum heim og skúla verður betri.

**Kt kostar nógv**. Tað er ikki ein eingangsjáttan, sum nógv halda. Aftan á 3-5 ár eru teldurnar uppbrúktar og gamlar. Stýriskipanir skulu endurnýggjast. Alnótin, teldurnar, kervið á skúlanum, printarar, skannarar og fototól. Alt kostar, og tað kostar nógv í mun til so nógv annað. Tí má tað almenna seta pengar av til hetta endamál. Og tað er eisini okkara uppgáva sum telduvørðar at vísa á henda tørv.

Skúlin – lærararnir teir flestu eru við á kt-økinum. Men tað almenna kundi verið nógv betur við. Við at givið játtanir til skeið virksemi og kt-tilfar. Men sum á so nógvum økjum, so verður ein samtykt gjørd fyrst, og vit lærarar verða blakaðir út í nakað nýtt, uttan at verða fyrireikaðir serliga væl. Hetta sama er galdandi innan natúr og tøkni, har manglandi undirvísingartilfar er ein stórur trupulleiki. Men hetta krevur bara meir av okkum lærarum, tað ger at vit mugu royna eftir besta førimuni at undirvísa; men vit mugu eisini ansa eftir ikki at brenna út; men endurnýggja okkum

dag frá degi og verða skapandi. Men hetta tekur nógva tíð og orku. Tí kt tekur nógva tíð.

Hví skal kt inn í skúlan? Um vit lesa tað, sum Steen Larsen sigur í: "Edb i skolen – et pædagogisk problem", fáa vit nakað at hugsa um.

"Grænserne for anvendelse af Edb i skole er derfor i realiteten ikke længere et teknologisk problem, men et pædagogisk problem. Kvaliteten af det arbejde der kan foregå i skolen ved hjælp af Edb afhænger derfor ikke længere af teknologien, men af kvaliteten af de pædagogiske overvejelser, der foregår i hovedet på dem, der anvender dem.

Hvis overvejelser kun går på, at den ny tekologi skal ind i skolen, fordi eleverne skal lære at arbejde med den, er der tale om overvejelser af så ringe kvalitet at alle besindige mennesker må forenes i en bestræbelse på at forhindre det.

Av alnótini. http://home4.inet.dk/larsen/edb.html

# 8. Spurningar til lærararnar.

KT- í undirvísingini.

| Spurningar í samband við verkætlan mína um KT- í barnaskúlanum. M.Bech. | Ja, (avgjørt.) | Ja, í ein ávísan mun. | Nei, í minni mun. | Nei, (als ikki) | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|
| Er KT ein partur av tykkara skúla? | | | | | |
| Er tykkara skúli væl fyri á KT økinum? | | | | | |
| Hevur tú undirvíst í KT? | | | | | |
| Kundi tú hugsað tær at undirvíst í KT? | | | | | |
| Er KT partur av tínari undirvísing. | | | | | |
| Hevur tykkara skúli eina KT lesiætlan? | | | | | |
| Hevur tú tikið onnur KT skeið? | | | | | |
| Samsvara skeiðini við tín KT tørv? | | | | | |
| Heldur tú, at møguleikin at koma á KT skeið er nøktandi? | | | | | |
| Er neyðugt við eini KT lesiætlan? | | | | | |
| Hevur tú KT koyrikortið? | | | | | |
| Røkkur KT førleikin hjá tær, til at fylgja eini KT | | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| lesiætlan? | | | | | |
| Skal hvør lærari sær hava ábyrgdina av, at lesiætlanin verður fylgd? | | | | | |
| Skal flokslærarin hava ábyrgdina av, at lesiætlanin verður fylgd? | | | | | |
| Skal skúlaleiðarin hava ábyrgdina av, at lesiætlanin verður fylgd? | | | | | |
| Verða teldurnar í tykkara skúla mest nýttar til spæl? | | | | | |
| Verða teldurnar í tykkara skúla, mest nýttar til undirvísing? | | | | | |
| Halda næmingarnir at teldan er spæl? | | | | | |
| Halda næmingarnir at teldan er undirvísing? | | | | | |
| Er nóg mikið av teldum í tykkara skúla? | | | | | |
| Virka teldurnar í tykkara skúla væl? | | | | | |
| Eru teldurnar í tykkara skúla nóg nýggjar? | | | | | |
| Eru ov nógvir pengar nýttir til KT? | | | | | |
| Um tit ikki høvdu KT, høvdu pengarnir verið nýttir til bøkur o.a? | | | | | |
| Er KT við til at gera skúlan betri? | | | | | |
| Er neyðugt við KT í skúlanum? | | | | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Er KT við til at gera skúlan meiri nútíðar hóskandi? | | | | | |
| Næmingar, ið als ikki nema KT í skúlanum, fara teir at klára seg í samfelagnum? | | | | | |
| Hava foreldrini ábyrgdina av KT menningini hjá børnum teirra? | | | | | |
| Er neyðugt við føroyskum undirvísingartilfari í KT? | | | | | |
| Hevur tú nóg góðan møguleika at nýta teldurnar í skúlanum? | | | | | |
| Er neyðugt hjá tær sum lærari at hava eina teldu heima? | | | | | |

Hvat heldur tú ein KT-lesiætlan skal innihalda?________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

Hevur tú onkra viðmerking til onkran av spurningunum, ella hevur tú okkurt gott hugskot um KT í skúlanum, ert tú vælkomin at skriva teir/tað her?

______________________________________________

______________________________________________

## 9. Spurningar til næmingarnar

**Teldan í undirvísingini.**

Spurningar til næmingar.

Er neyðugt við telduundirvísing?______________________________________________

Hvat heldur tú teldan skal brúkast til?________________________________________

______________________________________________________________________

______________________________________________________________________

Hvat heldur tú er ein góð telduundirvísing?____________________________________

______________________________________________________________________

______________________________________________________________________